Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Endometriosa

Spurningar:

1. Hvussu útbreidd verður sjúkan endometriosa mett at vera í Føroyum?
2. Hvørji heilsutilboð eru til kvinnur í Føroyum, sum hava endometriosu?
3. Er nøkur heildarætlan fyri at finna sjúkuna tíðliga og fyri linnandi viðgerðir og átøk, sum eisini hava til endamáls at fremja javnbjóðis møguleikar hjá hesum kvinnum at liva eitt gott lív í Føroyum?

Viðmerkingar:
Endometriosa hevur ígjøgnum søguna einfalt verið umrødd og fatað sum ring menstruatiónspína og líðingar, sum henni tilhoyra. Sambært WHO so eru tað umleið 10% av heimsins kvinnum, sum hava hesa líðing. Talan er um kroniska sjúku, sum elvir til ógvusliga pínu við menstruatión, ógvusliga bløðing, áhaldandi pínu í kokuni (men eisini aðrastaðni í kroppinum), barnloysi og vaml. Endometriosa veldur ofta trupulleikar t.d. við at lata vatn og skarn, fyri kynslív eins og tað kann ávirka sálarliga og vera atvold til angist og tunglyndi.

Sum skilst, so er eingin viðgerð tøk, sum grøðir endometriosu; viðgerð fyri endometriosu er mangastaðni sera avmarkað, sjúkan verður ofta seint funnin, og viðgerðin er tá vanliga at royna at avmarka langtíðarárin og at linna árinini av sjúkuni. Sum vitanin um hesa kvinnusjúku tíbetur tykist at vera vaksandi og tilvitið harvið, so eru tað lond, sum royna at taka endometriosu í størri álvara og leggja ætlanir fyri at diagnostisera tíðliga og menna vitan um viðgerðir, sum kunnu tálma og fyribyrgja ringastu avleiðingarnar.

Fyri kvinnuheilsuna er sera týdningarmikið, at sjúkan verður funnin nóg tíðliga, so at útbúgvingar- og yrkisleið eins og almenna heilsan hjá kvinnum kann betrast, so hin einstaka kann læra at liva við sjúkuni og teirri hjálp, sum eigur at vera at fáa í einum góðum landi.

Tað mesta, sum vit vita um sjúkuna í Føroyum, er frá teimum djørvu kvinnunum, sum hava verið frammi alment og greitt frá síni heilsustøðu og sínum lívi. Í Føroyum kunnu sjúkur vera yvirumboðaðar vegna ættarbregði, so tað hevði verið áhugavert at vitað, um mong hava endometriosu í Føroyum, at skapt meira tilvit um sjúkuna og fingið at vita, um ætlanir eru gjørdar um heilsuátøk fyri tær gentur og kvinnur, sum hava endometriosu, so tær kunnu fáa vitan, linna og hjálp tíðliga og leggja væl til rættis eitt nú í mun til at fáa børn.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 12. november 2025

Hanna Jensen